# Listaleypurin

Skúlaárið 2020-21

# VÆLKOMIN TIL LISTALEYPIN
# SKÚLAÁRIÐ 2020 – 21

**LISTALEYPURIN ER FYLTUR** við einum hópi av spennandi framførslum, dagsverkstovum og longri verkstovum. Leypurin hevur ikki færri enn 17 tilboð at velja ímillum á skránni fyri skúlaárið 2020-21.

Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni **www.listaleypurin.fo**. Her finna tit tilfar um hvørja einstaka verkætlan, sum hevur sín egna bredda á heimasíðuni. Eisini finna tit sjálvt tekningarskjalið á síðuni. Freistin fyri tilmelding er 15. septembur 2020.

Við bestu ynskjum um eitt gott skúlaár og eitt gott listaleypaár 2020-21.



*Rannvá Káradóttir, verkætlanarleiðari*


SOLEIÐIS VIRKAR LISTALEYPURIN ....4
NÝMÓTANS ENDURNÝTSLUKLÆÐIR ....6
SKRAMBUL HJÁ EINUM, SKARTGRIPIR HJÁ EINUM ØÐRUM ....8
BARNAJAZZUR ....10
MONKEYRAT DUO – KONSERT OG „OPEN MIC“ ....12
KJARNIN Í FILMSFRÁSØGNINI ....14
TÓNLEIKAKUFFERTIÐ ....16
1001 LEBEN ....18
CAPTAIN CREDIBLE & HIS ROBOT ORCHESTRA ....20
JAZZ KIDS ....22
TREÐUM LÆTTLIGA DANSIN ....24
EIN HEILUR ER EIN HÁLVUR OG TVEIR FJÓRÐINGAR ....26
ROMEO OG JULIA ....28
MELODISKIR LUTIR ....30
TRØLLADUKKUVERKSTOVA ....32
EG, TÓNASKALDIÐ ....34
HAR IÐ FJØLLINI HITTAST ....36
MYTOLOGISKAR VERUR ÚR SJÓNUM ....38

## SOLEIÐIS VIRKAR LISTALEYPURIN:

- Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.
- Forskúlar og skúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla út teldutøkt tekningarskjal á www.listaleypurin.fo
- Verkætlanarleiðarin samskipar skúlavitjanina í samráð við skúlar og listafólk. Listaleypurin roynir eftir førimuni at ganga øllum ynskjum á møti.
- Eftir vitjanina verður eftirmetingarskjal sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at tað verður útfylt.

## VIT MÆLA TIL:

- At næmingarnir eru við til at velja listavitjanir til skúlan. Hetta kann gerast við umboðum úr næmingaráðnum, ella við at flokkarnir stovna eitt listaráð og velja sær umboð at velja listavitjanir saman við lærarunum.
- At næmingaumboðini taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum saman við kontaktlæraranum.
- At lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini.

## KRØV TIL LUTTAKANDI SKÚLAR:

- At skúlin tekur væl ímóti listafólkunum og vísir teimum, hvar tey skulu vera.
- At skúlin sær til, at listafólkini fáa ta hjálp, teimum tørvar, so sum at bera inn, seta upp, taka niður o.a.
- At skúlin tryggjar sær, at hann lýkur krøvini til høli og tøkni fyri listavitjanina.
- At lærarin fyrireikar næmingarnar til listavitjanina soleiðis, at øll fáa sum mest burtur úr vitjanini.
- At lærarin hevur ábyrgd av næmingunum og er til staðar, meðan listavitjanin er.

*Freistin fyri tilmelding er 15. septembur 2020.*
*Eftir hetta verður skráin løgd fyri árið.*

**Listaleypurin fylgir leiðreglunum hjá Korona ráðgevingini**

FRIDA POULSEN | FO

# NÝMÓTANS ENDURNÝTSLU-KLÆÐIR



Í DAGSINS SAMFELAG har klæðini eru næststørsta kelda til dálking, fari eg at læra børnini, hvussu vit annaðhvørt kunnu halda fram at brúka tey klæðir, vit eiga, ella keypa endurnýtsluklæðir. Eg haldi tað vera sera týdningarmikið, at børn læra hetta tíðliga. Børnini, gentur og dreingir í øllum aldri, læra at seyma klæðir um og finna útav, hvussu lætt og stuttligt tað kann vera.



**HEITI:** **Nýmótans endurnýtsluklæðir**
**LISTAGREIN:** Sniðgeving
**SLAG:** Verkstova
**LONGD:** Longri verkætlan (2 heilar dagar)
**TÍÐARSKEIÐ:** 19.-30. oktobur 2020
**MÁLBÓLKUR:** 4.-7. flokkur | 8.-10. flokkur

**TAL AV NÆMINGUM:** 5-24 næmingar
**HØLI:** Vanligar skúlastovur. Okkum nýtist bert at brúka saks og hugflog.
**KRØV:** Børnini kunnu sjálv taka ymiskt við, sum er blivið ov lítið, ella okkurt, tey fegin vilja gera um o.s.fr.

KITT JOHNSON X-ACT | DK

# SKRAMBUL HJÁ EINUM, SKARTGRIPIR HJÁ EINUM ØÐRUM

KOM VIÐ Á ferð í eina ruskfylta verð! Kitt Johnson X-act leggur fram eina nýggja gandakenda framførslu. Kom við inn í ein heim, sum er fullur av ruski og gandi, og møt teimum sjáldsomu ruskskiljiserfrøðingunum: Annar hoyrir loyniliga tónleikin í ruskinum, og hin sær loynda vakurleikan í tí. Ein stuttlig og tónleikalig framførsla um burðardygd fyri yngstu næmingunum.







**HEITI:** **Skrambul hjá einum, skartgripir hjá einum øðrum**
**LISTAGREIN:** Leikur, nýsirkus
**SLAG:** Framførsla
**LONGD:** 45 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 26.-30. oktobur 2020
**MÁLBÓLKUR:** 0.-3. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 250
**HØLI:** Fimleikahøll e.l. Breidd: 7 m. dýpd: 8 m. hædd: 4 m.

Tað hevur týdning, at pallurin er ájavnur við fyrsta rað, av tí at nakað av sínámillum ávirkan er millum áhoyrarar og framførarar. Einki ljós er til uppsetingina: einki krav um myrkalegging, men einki beinleiðis sólarljós á pallin. Uppsetingartíð er einar 3 tímar.
**KRØV:** Eitt skúlaborð og ein stól. P.A. anlegg

RÚNI EYSTURLÍÐ, EDVARD NYHOLM DEBESS OG KATRIN Á BORG | FO

# BARNA-JAZZUR

**VIT BJÓÐA NÆMINGUM** til jazzkonsert við kendum føroyskum barnasangum. Sangirnar kenna tey flestu væl aftur, men teir hava allir ein eitt sindur øðrvísi tónleikaligan ham. Hetta er eitt einfalt konsept, har børnini bæði eru áhoyrarar og viðspælarar.






**HEITI:** Barnajazzur
**LISTAGREIN:** Tónleikur
**SLAG:** Framførsla
**LONGD:** 45 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 26.-30. oktobur 2020
**MÁLBÓLKUR:** 0.-3. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** Minst 10 børn (einki loft fyri, hvussu mong, bara rúmið loyvir tí, og tey síggja og hoyra)
**HØLI:** Konsertirnar kunnu verða framførdar allastaðni í landinum í nærum øllum hølum og krevja lítið av tekniskari útgerð. Tað tekur uml. 30 min. at rigga til og einar 20 min. at rudda av aftaná.
**KRØV:** Vit hava tað mesta av útgerðini við okkum, men til stór høli er gott, um eitt ljóðanlegg er tøkt.



MONKEYRAT DUO | FO

# MONKEYRAT DUO

*Konsert og „Open mic“*

MONKEYRAT DUO SPÆLIR eina konsert fyri næmingunum, og síðan verður „Open mic“. MonkeyRat Duo fara at framføra teirra heilt serligu løg í funk/jazz-stílinum. Í bólkinum eru: Anna Iachino sang og Arnold Ludvig á bass.

„Open mic“ er ein opin pallur fyri øll, ið vilja sleppa at bera fram sína list fyri øðrum. Eitt gott høvi hjá sangskrivarum, yrkjarum, søgusigarum og skemtarum at framføra egið tilfar. Næmingarnir fáa høvi at royna seg við síni list í einum umhvørvi, har øll eggja og stuðla hvør øðrum.

Tey, ið ikki vilja framføra, kunnu vera við sum áskoðarar.



**HEITI:** MonkeyRat Duo – Konsert og „Open mic“
**LISTAGREIN:** Tónleikur og øll útinnandi list annars
**SLAG:** Konsert og „Open mic“
**LONGD:** 2 tímar
**TÍÐARSKEIÐ:** 2.-6. november 2020
**MÁLBÓLKUR:** 4.-7. flokkur | 8.-10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 10 - 100
**HØLI:** Ein aula ella líknandi høli er best egnað til Open mic. Ein pallur er ynskiligur, men ikki eitt krav. Tað ber eisini til í skúlastovu ella tónleikastovu í smærri skúlum.
**KRØV:** Ynskiligt er at brúka ta útgerð, sum skúlarnir hava til taks. Til størri høli, sum ein aula ella høll, krevst eitt P.A. anlegg. MonkeyRat kunnu taka ein bass-forsterkara og 2 mikrofonir við.





KATRIN JOENSEN-NÆS OG
LEO LÁVÍK | FO

# KJARNIN Í FILMSFRÁSØGNINI

**ENDAMÁLIÐ VIÐ VERKSTOVUNI** er at geva næmingum íblástur at gera film, hóast tey ikki hava professionella tøkni. Leo og Katrin fara sjálvi at vera fyridømi og gera ein film við telefon, sum verður vístur næmingunum saman við einum dokumentari. Harumframt sleppa luttakararnir at gera sína egna film við telefon.



HEITI: **Kjarnin í filmsfrásøgnini**
LISTAGREIN: Filmslist
SLAG: Longri verkætlan (3 heilar dagar)
TÍÐARSKEIÐ: 2.-17. novembur 2020
MÁLBÓLKUR: 8.-10. flokkur
TAL AV NÆMINGUM: 8-20 næmingar
HØLI: Floksstova ella høli, ið kann bjálvast, t.e. tað skal bera til at lata hurðar og vindeygu aftur fyri at minka um ljóð uttanífrá. Gardinur skulu kunna dragast fyri vindeygu, so hølið verður so myrkt sum til ber.
KRØV: Ein projektørur, sum kann avmonterast, og hátalarar. Næmingurin skal hava fartelefon og teldu/ipad.



FLYTIFÓLK | FO

# TÓNLEIKA-KUFFERTIÐ

**FLYTIFÓLK FARA AT** taka børn við sær á eina tónleikaferð til støð, sum bæði eru verulig og hugsað. Teir fýra tónleikararnir – sum spæla klarinett, harmoniku, dupultbass og slagverk – taka tónleikakuffertið við sær at erta forvitnið og uppdagingar, so hvørt sum tey spæla løg úr ymsum londum og mentanum, og rannsaka kenslur bæði eydnusamar og syrgnar samstundis.



**HEITI: Tónleikakuffertið**
**LISTASLAG:** Tónleikur
**FRAMFØRSLA:** Leikur
**LONGD:** 40 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 9.-13. novembur 2020
**ALDURSBÓLKUR:** 0.-3. flokkur | 4.-7. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** Einki minsta- og mestamát – tað veldst alt um framførsluplássið
**PLÁSSKRØV:** Okkum tørvar eitt framførslupláss til fýra tónleikarar og ljóðføri – á leið 4m x 5m, umframt pláss til áskoðarar.
**KRØV:** El







JULIETTE RAHON & CO | DE

# 1001 LEBEN

**JULIETTE RAHON & CO** framføra eina dansisýning við íblástri frá Peter Pan í leikinum „1001 Leben". Ein verð við fantasi- og veruleikaupplivingum fullfíggja hvørja aðra og lata upp fyri møguleikanum um sínámillum rannsakan og reflektión. Áskoðararnir verða fluttir úr fantasiverðini Neverland til 21. øld. Tvørlistaligi bólkurin sýnir fram eitt utopiskt rúm við óvanligum kropsmáli, kreativum musikaliteti og sínum serliga dansitónleikateatri.

**HEITI:** 1001 LEBEN
**LISTAGREIN:** Dansur, tónleikur og sjónleikur
**SLAG:** Framførsla
**LONGD:** 60 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 11.-15. januar 2021
**MÁLBÓLKUR:** 4.-7. flokkur | 8.-10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 20-50
**HØLI:** Pláss til 4 dansarar og tónleikarar at flyta seg runt í
**KRØV TIL TØKNI OG ÚTGERÐ:** Ljóðanlegg
**UM TAÐ BER TIL:** Uppvørpu | 4 ymiskar ljóssetingar (ið lýsa huglag) | 6 stólar ella 1 bonk

CAPTAIN CREDIBLE | NO

# CAPTAIN CREDIBLE & HIS ROBOT ORCHESTRA



**LISTAMAÐURIN CAPTAIN CREDIBLE** er kendur fyri at spæla rokmiklan orkufullan electronica við íblástri frá jazzi og punki við einum hópi av kreativum heimagjørdur ljóðførum. Tólmenni, tónleikamenni, sum spæla klokkuspæl og sláa trummur, blinkandi ljóðpyramidur, ljóðborð úr bikarljósi og rørsluviðkvæmir tónleikahjálmar eru millum óvanligu amboðini, sum Captain Credible hevur við sær á konsert. Harumframt sleppa luttakararnir at byggja síni egnu tráðleysu tónleikamenni, sum teir kunnu stýra við sama stevi sum tónleikurin og konsertin.





**HEITI:** Captain Credible & his Robot Orchestra
**LISTAGREIN:** Tónleikur
**SLAG:** Framsýning við verkstovu
**LONGD:** Konsert 45 min. | Verkstovan uml. 1 tíma
**TÍÐARSKEIÐ:** 25-29 januar 2021
**MÁLBÓLKUR:** 4.-7. flokkur | 8.-10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 5-32 til verkstovu | Í mesta lagi 500 til hvørja konsert
**HØLI:** 2-3 stór borð, pláss til P.A. anlegg til konsertina. Til verkstovuna hava næmingarnir tørv á borðplássi og møguliga einum borði, har límpistólar kunnu verða brúktir. Hølini eiga at hóska til tað næmingatal, sum verður á konsertini.
**KRØV:** P.A. anlegg – helst við subwoofara og pallskíggja 3 stór borð | Gott, men ikki neyðugt við uppvørpu og lørifti





IMPROBASEN | NO

# JAZZ KIDS

**JAZZ-VERKSTOVA OG KONSERT** við næmingum frá Improbasen í Noregi. Næmingarnir sleppa at spæla upp á ljóðføri í samspæli við hvønn annan og instruktørarnar og læra ymsar teknikkir og nærkast jazzspæli og improvisasjón. Skeiðið krevur ongan forkunnleika. Jazzpedagogarnir úr Noregi, ið standa fyri skeiðnum, hava drúgvar royndir og eru vanir við at fáast við gehørgrundaða frálæru við ongum uppriti.

**HEITI:** Jazz Kids
**LISTAGEIN:** Tónleikur, jazzur
**SLAG:** Framførsla við verkstovu
**LONGD:** Verkstovan er ein fyrrapart og konsertin 45 min.
**TÍÐARSKEIÐ:** 25.-29. januar 2021
**MÁLBÓLKUR:** 4.-7. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** Verkstova við 5-15 næmingum. Konsert fyri øllum skúlanum, um pláss er til tað.

**HØLI:** 1-2 bólkarúm til verkstovuna – helst eina tónleikastovu. Pallur, samkomuhøll, fimleikahøll ella konserthøll til konsertina. Verkstovan kann eisini vera á pallinum, um hølið ikki verður brúkt til annað virksemi júst tá.
**KRØV:** Helst eitt akustiskt piano og eitt trummusett. Um skúlin ikki eigur nakað tøkt, kunnu vit avtala at hava tað við okkum á skúlan.

JÓNLEIF JOHANNESEN | FO

# TREÐUM LÆTTLIGA DANSIN

**VERKÆTLANIN HEVUR TIL** endamáls at læra næmingarnar at bera fram føroysku kvæðini soleiðis, at dansurin verður eitt samspæl millum søguna, tempo, lag og stev, sum ganga saman í eina hægri eind. Fyri at ogna næmingunum henda førleika verða fjølbroyttir læruhættir við virknum luttakarum brúktir.





**HEITI:** **Treðum lættliga dansin**
**LISTAGREIN:** Dansur
**SLAG:** Verkstova
**LONGD:** 2 tímar
**TÍÐARSKEIÐ:** 25. januar – 5. februar 2021
**MÁLBÓLKUR:** 0.-3. flokkur | 4.-7. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 10-50
**HØLI:** Hølið má vera so stórt, at vit kunnu fara upp á gólv.
**KRØV:** Neyðugt er at hava netsamband og at fáa spælt stutt filmsbrot við ljóði og myndum upp á lørift.





GAZART | DK

# EIN HEILUR ER EIN HÁLVUR OG TVEIR FJÓRÐINGAR

**GAZART HEVUR GJØRT** eina sýning, sum eitur „Ein heilur er ein hálvur og tveir fjórðingar“, um at vera tvíbólabarn og liva í fleiri húskjum. Við dansi, tónleiki, skemti og veruligum frásagnum frá børnum, sum sjálvi liva í hjúnaskilnaðarhúskjum, kava vit heilt niður í gerandisdagin hjá einum tvíbólabarni við stjúkfamiljum, tvíbólasystkjum, skiftidøgum og øllum hinum. At uppliva hjúnaskilnað og at verða tvíbólabarn verður fatað sum okkurt heilt vanligt, men hjá tí einstaka barninum er hetta mangan ein sorgarleikur, sum kann geva ógvislig kenslulig sveiggj og kann kennast ógviliga einsligt. Tí er tað eitt týdningamikið evni at arbeiða við.



**HEITI:** Ein heilur er ein hálvur og tveir fjórðingar
**LISTAGREIN:** Dansur
**SLAG:** Sýning við verkstovu
**LONGD:** 45 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 22.-26.feb 2021
**MÁLBÓLKUR:** 0. - 3. flokkur | 4. - 7. flokkur | 8. - 10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 10-30 til verkstovuna | 100 til sýningina
**HØLI:** Pallvídd dýpd: 6 m. breidd: 8 m. hædd: 3 m., umframt áskoðarar. Rúmið skal kunna verða myrkalagt og má hava vanligan streym. 2,5 tíma til at koma inn og 1,5 tíma til at fara út.
**KRØV:** Vit koma sjálv við allari tøkniútgerð.



KOMPANI13 | NO

# ROMEO OG JULIA

**KOMPANI13 BER FRAM** heimsins sterkastu kærleikssøgu „Romeo og Juliu“ í heilt nýggjum búna. Sjónleikararnir nýta einfalda ávirkanarmegi og einfaldar frásøguhættir, sum eru á markinum millum figurleik og frásøguleik og gera næmingarnar til part av framførsluni uttan at samvirkanin gerst ágangandi. Næmingarnir sita mitt í dramanum, sum fer fram í hesum frásagnarliga sorgarleikinum. Miðlanin er innilig og einføld og stuttlig og spennandi at uppliva.

**HEITI:** **Romeo og Julia**
**LISTAGREIN:** Leikur
**SLAG:** Framførsla
**LONGD:** 60 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 22. - 26. februar 2021
**MÁLBÓLKUR:** 8. - 10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 35
**HØLI:** Henda útgáva av „Romeo og Juliu“ kann verða spæld, hvar tað skal vera. Tað einasta, ið krevst, eru nøkur røð av stólum, og næmingarnir kunnu eisini sita á borðunum. Eitt vanligt flokshøli er nóg gott.
**KRØV:** Eingi krøv til tøkni ella útgerð. Einasta, ið brúkt verður, er ein flipover, ið vit annaðhvørt hava við ella lána á staðnum.



JAY GILLIGAN | SV

# MELODISKIR LUTIR

**MELODISKIR LUTIR BERA** fram fimlan sum tónleik fyri eyguni! Ber tað til at hoyra litir? Henda framførsla fær lív í tónleikin og ger hann til lutir, tú kanst nema við! At fimla verður brúkt til at gera eitt visuelt partitur fyri eina livandi ljóðrás – ein fagnaður fyri eygu og oyru.





**HEITI:** **Melodiskir lutir**
**LISTASLAG:** Tónleikur, sirkus, dansur, leikur
**FRAMFØRSLA:** Framførsla við verkstovu
**LONGD:** 45 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 8. - 12. mars 2021
**MÁLBÓLKUR:** 0. - 3. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 60
**PLÁSSKRØV:** Helst skal tað vera í minsta lagi 2 × 2 m. Hædd upp til loftið skal helst vera minst 2.5 m, men eg kann laga tað til, um neyðugt. Framførslan er ætlað at vera í vanligum dagslýsi og krevur ikki myrkalegging.
**KRØV:** Eg taki mína egnu útgerð við til framførsluna. Tað einasta, mær tørvar, er el. Eg havi mítt egna ljóð og ljós við mær. Tað tekur 45 minuttir at seta upp og 30 minuttir at taka niður.

HANDBENDI BRÚÐULEIKHÚS | IS

# TRØLLADUKKU- VERKSTOVA

**KAVA NIÐUR Í** íslendsku søgurnar um trøll og huldufólk og slepp skapanarevnunum leysum, tá ið tú gert tær eina trølladukku úr náttúru- og endurnýtslutilfari. Dukkustjórin Greta Clough stjórnar verkstovuni. Hon er listarligur stjóri á íslendska dukkuleikhúsinum Handbendi Brúðuleikhús, sum hevur vunnið altjóða virðisløn.







**HEITI: Trølladukkuverkstova**
**LISTAGREIN:** Dukkusjónleikur, sniðgáva, at siga søgur
**SLAG:** Verkstova
**LONGD:** 90 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 15. - 19.mars 2021
**MÁLBÓLKUR:** 0. - 3. flokkur | 4.-7. flokkur | 8.-10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 15
**HØLI:** Nóg mikið av borðum til næmingarnar at arbeiða á
**KRØV:** El til heitlímpistól

ASYNJA SAXOPHONE QUARTET | FO/DK

# EG, TÓNASKALDIÐ

**„EG, TÓNASKALDIÐ" GEVI** børnunum neyðugu amboðini, so tey kunnu gera sín egna tónleik og á tann hátt kalla seg tónaskald. Kvartettin undirvísir við at brúka sjón-og hoyrnsansirnar við einum dismi av ástøði. Verkstovan endar við, at saksofonkvartettin hevur eina pinkukonsert fyri øllum flokkinum og framførir nýggju verkini hjá børnunum.





**HEITI:** Eg, tónaskaldið
**LISTAGREIN:** Tónleikur
**SLAG:** Framsýning við verkstovu
**LONGD:** 180 minuttir
**TÍÐARSKEIÐ:** 22. - 26. mars 2021
**MÁLBÓLKUR:** 0. - 3. flokkur | 4. - 7. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 6 - 28
**HØLI:** Vanligt undirvísingarhøli umframt eyka arbeiðshøli til bólkaarbeiði.
**KRØV:** Neyðugt er at sleppa fram at kopimaskinu. Børnini skulu hava pappír, litblýantar og tussj við sær.



EVA BULLENS OG FLOORTJE ZONNEVELD | NL

# HAR IÐ FJØLLINI HITTAST



**HEITI:** **Har ið fjøllini hittast**
**LISTAGREIN:** Audio-visuell list og staðbundin mentanararvur
**LONGD:** Longri verkætlan (4 heilar dagar)
**TÍÐARSKEIÐ:** 12. apríl – 14. mai 2021
**MÁLBÓLKUR:** 4. - 7. flokkur 8. - 10. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 1 flokkur í hvørjum skúla – 6 - 30 næmingar í hvørjum flokki
**KRØV:** Vit hava alla upptøkuútgerð við okkum

**Í HESARI LISTAVERKÆTLAN** gera næmingarnir eina ljóðspáking úti við denti á at tulka náttúruna, á skapandi søgufrásøgn og mentanararv ígjøgnum spæl. Siðvenja hevur verið at bera søgur tvørtur um fjøll, úr einari bygd í aðra. Ljóðspákingin gevur teirra samtíðarsøgum ein pall, sum er sum ein tíðarlummi, sum leggur nýggjar gøtur í lendið og í hugan.



RUTH LERCHE OG MARIA LAU KROGH | DK

# MYTOLOG-ISKAR VERUR ÚR SJÓNUM

*– ein tvørlistarlig ferð gjøgnum frásøgn, pappír og saks*

NÆMINGARNIR ARBEIÐA VIÐ norðurlendskum havverum og mytum gjøgnum frásøgn og psaligrafi (pappírslist). Á hesi tvørlistarligu verkstovu fáa næmingarnir amboð at úttrykkja, miðla og tulka eina mytu við tilfari og kroppi. Teir gera sjálvir ein 3D-kassa/heim við støði í teirri veru og tí úttrykkið, sum teir velja.





**HEITI: Mytologiskar verur úr sjónum** – *ein tvørlistarlig ferð gjøgnum frásøgn, pappír og saks*
**LISTAGREIN:** Mynd- og palllist
**SLAG:** Verkstova
**LONGD:** Ein fyrrapart
**TÍÐARSKEIÐ:** 17. - 21.mai 2021
**MÁLBÓLKUR:** 4. - 7. flokkur
**TAL AV NÆMINGUM:** 30
**HØLI:** Flokshøli, helst 40 - 60 m²
**KRØV:** Vit koma við øllum sjálv

# Listaleypurin

## Fá meira at vita á www.listaleypurin.fo

Skúlarnir gjalda onki fyri vitjanina.
Norðurlandahúsið, Mentamálaráðið
og kommunurnar bera allan kostnaðin.

**Umsiting hjá Listaleypinum:**
R.C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
tlf. +298 277 747
listaleypurin@listaleypurin.fo

Kommunufelagið

Mentamálaráðið

Norðurlandahúsið
í Føroyum